## Teitið aftur á palli



Eftir at onki norðoyastevnuteiti var í fjør, er tað komið afturí aftur í ár. Klaksvíkar Sjónleikarafelag hevur sett eitt teiti upp á beinini, og verður tað á skránni fríggjakvøldið, tvær ferðir leygardagin og tvær ferðir sunnudagin í mentunarhúsinum Atlantis. Síðani verður spælt alt eftir, hvussu áhugin er, gjøgnum vikuna aftan á norðoyastevnu.

Ongin filmur koyrir í biografinum um stevnuna. Men mikukvøldið eftir stevnuna verður aftur filmur á skránni. Tá verður filmurin Van Helsing á skránni. Og vikuna eftir kunnu fólk gleða seg til at síggja stórfílmarnar Passion of the Christ hjá Mel Gibson og Troy við millum annað Tom Cruise og Brad Pitt.

## G-bussur á norðoyastevnu

Tey, ið fyrireika G-festivalin í Gøtu í ár, verða eisini við á norðoyastevnu í ár. Tey koma við einum serligum G-bussi út á kappróðrarøkið, meðan kappróðurin er. Har fer so at bera til at keypa sær atgongumerki til festivalin. Umframt aðrar lutir. Eisini hava fyrireikararnir ætlanir um at hava livandi tónleik við í bussinum. Hetta fyri at undirhald eisini skal vera á staðnum.

Jón Tyril, sum er ein av fyrireikarunum, sigur, at eitt vikuskiftispass til festivalin kostar í dag 455 krónur, og ta fyrstu vikuna seldu tey 370.

– Tað er tríggjar ferðir so nógv sum í fjør, so vit eru avbera vælnøgd, sigur hann.



*Hákun Dam varð føddur og vaks upp í høvuðsstaðnum, men í 1989 flutti hann norður til Klaksvíkar. Hann arbeiðir í Tryggingarfelagnum, og eisini er hann deknur í Christianskirkjuni*

Mynd: Jens K. Vang

# Havnarmaður bleiv klaksvíkingur

**Hákun Dam hevur búð í Klaksvík í 15 ár. Hann varð føddur og uppvaksin í Havn, men í dag er hann klaksvíkingur, sum heldur við KÍ og er deknur í Christianskirkjuni. Hákun sigur, at hann hevur ongan longsul eftir at flyta aftur til Havnar, og hann trívist væl millum klaksvíkingar**

NORÐOYASTEVNA 2004
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Havnarmaðurin Hákun Dam er ein vælkendur klaksvíkingur í dag. Hann fann sær konu í Klaksvík og flutti norður at búgva í 1989. Hann sigur, at hann altíð hevur kent seg væl í Klaksvík, og at klaksvíkingar eru eitt blítt og opið fólkaslag, sum hann trívist sera væl ímillum. Og hann hevur so at siga heldur ongantíð hoyrt nakað fyri tað frá havnafólki.

– Einaferð spurdi ein havnarmaður meg, hvat hundan eg gjørdi í Klaksvík, tí at "Klaksvík", var hvørki fuglur ella fiskur, greiðir Hákun flennandi frá.

Tað er ikki altíð so lætt at flyta frá sínum heimstaði, men Hákun sjálvur dugdi væl at koma út í millum fólk. Í fyrstuni ferðaðist hann tó ímillum, meðan hann starvaðist á Tórshavnar Skipasmiðju.

– Tað var í teimum døgum, tá Smyril sigldi av Klaksvík til Havnar klokkan hálvgum sjey um morgunin, greiðir hann frá. Honum dámdi sera væl at arbeiða á Skipasmiðjuni. So væl, at hann ferðaðist ímillum líka til í 1992, tá hann fekk starv á deildini hjá Tryggingarfelagnum í Klaksvík, og har arbeiðir hann enn í dag.

Hann fór upp í nevndina í Klaksvíkar Ítróttarfelag, sang við í manskórinum í Klaksvík, var eitt skifti formaður í Norðoya Javnaðarfelag og sat eisini í nevndini fyri røktarheimið. So ikki kann annað sigast, enn at fryntiligi havnarmaðurin hevur verið sera virkin í lokalsamfelagnum í Klaksvík hesi 15 árini hann hevur búð í býnum.

### Deknur

Eitt annað starv, sum Hákun eisini hevur í Klaksvík, er sum deknur í Christianskirkjuni. Og tað er eitt starv, sum hann gongur sera høgt uppí. Hákun greiðir frá, at tað var Henning Bøgesvang, sum tá var prestur í Klaksvík, sum heitti á hann at vera deknur.

– Eg segði ja beinanvegin, og tann 26. mars 1995 vórðu Karl Gudmund Henriksen og eg innsettir sum deknar í Christianskirkjni, minnist Hákun aftur á.

At vera deknur gerst ein partur av einum, heldur hann fram. Hann viðgongur, at tað hevur havt sína ávirkan á hansara gerandisdag og lívsstíl, men kortini heldur hann ikki, at hesi høvdu verið so øgiliga nógv øðrvísi, um hann ikki hevði verði deknur.

Hákun sigur, at tað at vera deknur er bara nakað, sum situr fast í dag. Hann fer altíð niðan í kirkjuna leygarkvøld at gera alt klárt til gudstænastuna sunnumorgnar. Og til aðrar kirkjuligar handlingar tað sama.

Væl dámar honum at lesa lestur. Hann fyrireikar seg altíð væl og roynir at finna góðar og áhugaverdar lestrar.

– Ein lestur skal vera gevandi og sigandi, heldur Hákun Dam.

### Ítróttur

Sum sagt hevur Hákun verið sera virkin í KÍ. Fótbóltur er hansara hjartabarn, og er tað enn tann dag í dag. Hann hyggur at hvørjum dysti hjá KÍ, og viðgongur hann beinanvegin, at hann er KÍ-ari í dag.

– Men um KÍ ikki gerst føroyameistari, so má tað vera HB, sigur hann við einum smíli.

So røturnar spøkja kortini aftur, og tað er helst ikki so løgið, tá ein er føddur og uppvaksin aðrastaðni enn har ein setur búgv.

Hákun kom í nevndina í KÍ í 1995. Tað var ein trímannanevnd við Árna Joensen sum formanni, og Svend Jacobsen og so Hákun.

Her tók Hákun sær fyrst og fremst av Evropa Cup luttøkuni hjá felagnum, og ferðini niður til Haifa í Ísrael. Eisini tók hann sær av innkrevjingini til allar heimadystirnar í langa tíð.

Dysturin sum stendur fremst í minninum hjá Hákun frá tí tíðini er, tá Olgar Danielsen skoraði trý mál á Svangaskarði móti Macabi Haifa í oktober 1995. Tann dystin vann KÍ 3-2, og hann stendur púra klárur í minninum hjá Hákuni.

– Tað var ordiliga vell, sigur hann og ljóðar júst sum aðrir klaksvíkingar.

### Neyvan aftur til Havnar

Spurdur um hann kundi hugsað sær at flutt aftur til Havnar at búð, sigur Hákun, at sjálvandi kundi hann væl búð har aftur, men treytað av at konan og sonurin komu við.

– Men tað er ikki nakað, sum eg gangi og ynski, staðfestir hann.

Hann sigur, at hann hevur tað gott í Klaksvík og dámar væl. Um hann verður spurdur, hvaðani hann er, svarar hann sum oftast úr Klaksvík, men um hann verður spurdur, hvar hann er ættaður, svarar hann sjálvandi - úr Havn.

Tað hoyrist á Hákuni, at hann er havnarmaður, tí hann sigur EI. Men tað heldur hann sjálvur er nakað rótut nú eftir so mong ár í Klaksvík.

– Eg hugsi ikki um, nær eg sigi ei ella oy, tað kann gott vera, at onnur gera tað. Men tað er ikki nakað, sum eg sjálvur gevi mær far um, sigur Hákun Dam at enda.






